# Kvalitetsvørur fyri bíligan penga



Sp/f Byggitilfar er eitt nýtt føroyskt felag, hvørs endamál er at fáa til vega útvalt dygdartilfar til lágan verksmiðjuprís.

Fólkið aftan fyri felagið hevur drúgvar royndir við húsabygging, bæði í Føroyum og uttanlands

Okkara kundar eru fyri tað mesta entreprenørar, handverksmeistarar og timburhandlar v.m. Men privatir kundar við størri ordrum eru sjálvandi eisini vælkomnir at biðja um eitt tilboð.

**Byrjanin**

Byggitilfar liggur mitt í býnum á Hoyddalsvegi nr 8, tætt við SMS yvir av KFUM, í gomlu húsunum hjá Gunnar Stockholm.

Byggitilfar er stovnað í 2003, tvs ein rættiliga nýggj fyritøka, sum í byrjanini bert legði seg eftir at selja vindeygu og betongelementir

Í byrjanini seldi Byggitilfar bert vindeygu og betongelementir. Byggitilfar hevur síðan økt um úrvalið og verður hetta gjørt so líðandi, fyri at kunnu geva ein góða tænastu fyri allar vørurnar íð seldar verða.

**Konseptið**

Byggitilfar hevur einans specialiserað seg í at veita tær bestu útvaldu kvalitetsvørurnar innan vindeygu, betonelementir, gólv, flísar úr natúrsteini og glasveggum.

Byggitilfar er umboðað av Harald Winther Knudsen og Dánjal Paula Mohr.

Konseptið er einfalt, kundin skal hava møguleika at keypa tey bestu dygdarmerkini til sama og helst undir søluprísin frá øðrum støðum í Norðanlondum.

**Søla og samstarv uttanlands**

Tá prísir og góðska er kappingarfør í Norðanlondum selur Byggitilfar eisini til kundar uttan fyri Føroyar.

Byggitilfar hevur sera tætt samstarv við nøkar av best kendu dygdarmerkjavørunum í byggivinnuni:

Velfac, vindeygu
Dinesen, gólv (massivt gólv)
Tinglev Elementfabrik (Betongdekk og –veggir)
DEKO, glasveggir
Stenex, nattúrsteinar og flísar

**Dygdargóð vindeygu**

Fyri at taka eitt dømi um teirra virksemi, er her valt, at lýsa vindeyguni, ið fyritøkan selur.

Við Velfac-vindeygunum er tað lættari at vera húsaeigari. Velfac vindeygu eru aluminium ella træ uttan. Hetta ger, at tey hóska bæði til nýggj og gomul hús. Vindeyguni verða framleidd eftir tørvi og ynski kundans, og tey fáast í alskins sniðum.

Umframt haldgóða dygd, bjóðar Sp/f Byggitilfar, heili 10 ára garanti.

*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*




Haldið Sosialin – altíð við tí nýggjasta!



Haldið Sosialin
Tekna teg sum haldara nú
475,- um ársfjórðingin
sparið 370,- í mun til leysasølu

Í dag er neyðugt hjá øllum at fylgja væl við í fjølmiðlunum, har vinnulív, politikkur, mentan, handil o.a. verður dagliga viðgjørt.

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óportað. Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Bygd / býur:
Telefon:
Undirskrift:

**Besta keldan til:**
» Vinnulívið
» Ítrótt
» Mentan
» Politik
» Bilar
» Merkisdagar
» Heilsanir
» Tiltøk
...o.m.a.

**Send lepan til:**
Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn